ISBN 99918-955-9-0

# Kommunalt samstarv

## - ein onnur loysn enn kommunusamanlegging ?

Dennis Holm og Bjarni Mortensen[I]

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 1/2002**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýbd enn verulig granskingarprojekt. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. kanningararbeiði sum granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarprojektum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivaði á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnaði til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

---

[I] Dennis Holm og Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingar, starvast dagliga sum granskarar á Granskingardeplinum fyri Økismenning.

## Innihaldsyvirlit

**Úrtak** ..... 4
**Inngangur** ..... 4
**Føroysku kommunurnar í broyting** ..... 5
Kjakið um skipan av føroysku kommununum ..... 6
*Kommunala skipanin og spurningurin um kommunusamanlegging* ..... 7
Kommunalt samstarv í Føroyum ..... 9
**Háttalag** ..... 10
**Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum** ..... 11
Byrjanin: Felags teknistovu og heilsu- og heimarøkt ..... 12
Umsiting sett á stovn í 1987 ..... 12
Felags brunaumsjón í 1987 ..... 13
Víðkan av Kommunufelagsskapinum í 1994 ..... 13
Teknistovan verður niðurløgd í 1993 ..... 14
Umhvørvisnevndin í 1995 ..... 14
Felags tannarøkt í 1996 ..... 15
Ein kommunulækni afturat í læknadøminum í 2001 ..... 16
Ellis- og røktarheim í 2002 ..... 16
Bygnaður ..... 17
*Víðkan av samstarvinum* ..... 20
*Uppsøgn av limaskapinum í Kommunufelagsskapinum* ..... 20
Fígging ..... 21
**Kommunufelagsskapurin umsitur stór málsøki** ..... 21
**Lærutilgongdin við Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum** ..... 23
1971-1985: Árini áðrenn Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum varð stovnaður ..... 23
1985-2002: Árini meðan Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum hevur virkað ..... 23
**Kommunufelagsskapurin og trupulleikar hjá smærri kommunum** ..... 25
Umsitingarlig og fíggjarlig orka ..... 25
*Brunanevndin* ..... 26
*Umhvørvisnevndin* ..... 26
*Ellis- og røktarheimi* ..... 27
*Felags umsiting* ..... 27
Spurningurin um rættartrygd ..... 27
*Ætlaðu at skipað barnaforsorgina eftir sama leisti* ..... 29
Kommunalt samstarv og skerd demokratisk rættindi ..... 29
Kommunalt samstarv kann gerast stirvið, um tað verður ov umfatandi ..... 30

**Framtíðin hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum** ...................................... 31
**Kommunalt samstarv, ein loysn?** ........................................................................ 31
**Bókmentir** ......................................................................................................... 34

## Úrtak

*Hetta arbeiðsritið er um Kommunufelagsskapin í Sundalagnum, ið verður lýst sum ein case, ið kann siga okkum nakað um, hvørt kommunalt samstarv kann vera ein onnur loysn uppá teir trupulleikar sum føroysku kommunurnar hava at dragrast við enn kommunusamanlegging. Hetta rit er grunað á bókmentakanningar og samrøður við lyklapersónar. Í arbeiðsritinum vera trupulleikarnir við føroyska kommunubygnaðinum stutt lýstir.*

## Inngangur[II]

Seinastu árini er kjakið um kommunalu skipanina í Føroyum vorðið ein alsamt størri partur av politiska kjakinum. Hetta kjakið hevur millum annað viðgjørt spurningin um skipan av kommunalu eindunum, um uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, og spurningin um kommunusamanlegging, fyri at nevna nakrar.

Hetta arbeiðsrit er ætlað sum eitt ískoytið til kjakið um kommunalu skipanina í Føroyum. Men í mun til undanfarnu frágreiðingar og álit um kommunuviðurskifti í Føroyum, leggur arbeiðsritið dent á at viðgera spurning um kommunalt samstarv í Føroyum. Hettar er eitt evnið, ið ikki hevur fingið stórvegis umrøðu í kjakinum um føroysku kommunurnar og kommunalu skipanina í Føroyum.

Útgangsstøðið fyri hesum arbeiðsriti er ein lýsing av tí mest umfatandi kommunala samstarvinum í Føroyum, ið er Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum. Viðgjørd verður bakgrund, samstarvsøki og bygnaður. Harumframt verða fyrimunir og vansir við hesum kommunala samstarvinum viðgjørdir. Endamálið við hesum riti er eisini at umrøða, í hvønn mun skipanin í Sundalagnum kann sigast vera ein loysn á trupulleikunum hjá smærri kommununum. Her verður serliga hugsað um:

- vantandi umsitingarligari orku
- vantandi fíggjarligari orku

[II] Hetta arbeiðsrit er í stóran mun grundað á samrøður við fólk, ið á einhvønn hátt eru knýtt at Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, umframt at samrøður eru gjørdar við embætisfólk í landsumsitingini og við fólk, ið eru knýtt at øðrum kommunalum samstørvum í Føroyum. Vit vilja í hesum sambandi serliga veita eina tøkk til Jógvan og Ragnhild Mørkøre úr Hósvík og Johan Petur

- rættartrygd (serliga viðv. spurninginum um ógegni)

Arbeiðritið er býtt upp í tríggjar partar. Tann fyrsti parturin er eitt innleiðandi kjak til annað part, høvuðspartin í ritinum, sum er ein lýsing av Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum. Triði og seinasti parturin í ritinum dregur saman um høvuðsevnini, ið viðgjørd verða í innleiðandi kjakinum, sæð í mun til royndirnar frá kommunala samstarvinum í Sundalagnum. Harumframt verður eisini viðgjørt um kommunala samstarvið í Sundalagnum er ein leistur, sum aðrar smærri kommunur kunnu fáa gleði av.

Grundhugsanin í hesum arbeiðsriti er, at tað er av týdningi at læra av egnum royndum. Hetta er eisini galdandi fyri skipanina av føroysku kommununum. Í álitinum um uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunu verðu lagt upp til, at fleiri og fleiri uppgávur skulu flytast frá land til kommunur at umsita (Løgmansskrivsstovan, 2001). Harumframt verður latið upp fyri, at kommunur kunnu samstarva um at umsita hesi viðurskifti (Løgmansskrivsstovan, 2001: 84). Sostatt er tað natúrligt at hyggja at, hvørjar royndir eru við kommunalum samstarvi í Føroyum.

## Føroysku kommunurnar í broyting

Spurningurin um, hvussu kommunurnar í Føroyum skulu skipast, er ikki nýggjur. Longu í 1969 varð spurningurin viðgjørdur av nevnd, sum landstýrið setti[1]. Arbeiðið hjá hesi nevndini varð grundarlag undir kommunulógini frá 1972, sum var lógarkarmur fyri skipanina av kommununum inntil januar 2001, tá galdandi kommunulóg kom í gildi (Kommunustýrislógin, 2000).

Sambært lóg er heimilað kommununum at skipa egin viðurskifti innan nógv ymisk økið. Hesi økið kunnu í stuttum bólkast at umfata hesi viðurskifti (Holm og Mortensen, 2001):

- *Persónlig viðurskifti*: útbúgvingarmál, heilsu- og almannamál, barna- og frítíðaransing, útstykking/býarplanlegging.

Petersen av Norðskála, ið hava hjálp okkum við tilfari um Kommunufelagsskapin í Sundalagnum. Teir feilir og lýtið, ið kunnu vera í arbeiðsritinum eru okkara ábyrgd.

- *Frítíðar viðurskifti*: umstøður/karmar til ítróttin, fornminnir, bókasøvn og onnur mentunarligir viðurskifti.
- *Umhvørvi*: umhvørvisvernd, vegir og flutningur, planlegging.
- *Tilbúgving*: brunaumsjón, brúkaravernd (m.a. matvørueftirlit).
- *Handils- og vinnulig menning*: lokalur vinnulívspolitikkur, undirstøðiskervi, kommunalu búskapar/fíggjar viðurskifti

Ein partur av hesum viðurskiftum verða skipaði av kommununum eina, onnur verða partvíst skipaði av kommununum og partvíst av landsstovnum, meðan landsstovnar (t.d. Heilsufrøðisliga Starvsstovna og Almannastovan) í nøkrum førum loysa uppgávurnar fyri kommunurnar. Hartil er tað ymiskt frá kommunu til kommunu, hvørji viðurskifti verða skipaði av kommununi, hvørji í felag av kommuni og landsstovnum, og hvørji av landsstovnum. Hetta millum annað ein av trupulleikunum, ið víst verður á, tá ið tosað verður um, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur er ógreitt[2].

### *Kjakið um skipan av føroysku kommununum*

Í kjakinum um, hvussu kommunurnar skulu skipast, hevur eitt av evnunum verið spurningurin um støddina á kommunalu eindunum. Hóast tað eru ymiskar meiningar hesum viðvíkjandi, so hava flest allar frágreiðingar um skipanina av kommununum víst á tørvin á størri kommunalum eindum, fyri at betra um kommunalu umsitingina (Nevndin til kanningar av kommunuviðurskiftunum, 1971; Kommunubólkurin, 1992; Kommununevndin, 1996; - 1997; - 1998a; - 1998b). Tílíkar frágreiðingar í grannalondum okkara koma eisini við somu niðurstøðum. Millum annað var ein av niðurstøðunum í frágreiðingini hjá norska *Christiansenutvalget*, "*at kommunene sum hovedregel ikke bør være mindre enn 5000 innbyggere*" (Myrvold, 2001: 5)

Í hesum sambandi hevur verið víst á, at største trupulleikin við verandi kommunalu skipanini er, at tær kommunalu eindirnar eru ov smáar at umsita tey málsøki, ið tær sambært galdandi lóg skulu umsita[3]. Harumframt hevur verið víst á, at smærri kommunur ikki megna at veita sama tænastustøðið sum tær størru kommunur; tað eru tó ymiskar meiningar um hetta[4].

Afturat tí umsitingarliga trupulleikanum, hevur eisini verið víst á, at smærri kommunurnar hava vantandi fíggjaliga orku. Víst verður á, at flestu kommunurnar eru so smáar, at tær m.a. orsakað av vantandi búskaparligari orku ikki sjálvar megna at loysa tær mest vanligu kommunalu uppgávurnar (Kommununevndin, 1996: 18). Harumframt verður eisini víst á, at tær flestu kommunurnar hava so lítla búskaparliga orku, at tær ongan skrivara hava ella einans hava skrivara í parttíðar starvi (Kommununevndin, 1998b: 25).

Ein triðja atfinning, í sambandi við støddina á kommununum vísir til spurningin um ógegni. Hendan atfinning er serliga knýtt at teimum smærru kommununum, har fólk flest antin eru skyldfólk ella kennast væl, og tískil eru nógv mál, har limir í kommunustýrinum eru ógegnigir. Hesi mál kunna til dømis umfata mál har kommunustýrislimurin beinleiðis ella óbeinleiðis er partur í málinum ella mál har skyldfólk eru partur av málinum (sí eisini Rasmussen, 1987[5]).

Í einum størri høpi fevnir spurningurin um ógegnið segum spurningin um rættartrygdina hjá borgarum. Hesin spurningur snýr seg um tvinnanda viðurskifti. Fyrsta er, at borgarin hevur krav uppá, at mál, ið verða viðgjørd í eitt nú kommunalum høpi, verða viðgjørd av gegnigum persónum og innan eina ávísa tíðarfreist. Harnæst skulu mál viðgerðast í mun til galdandi lóg og kunngerðir, umframt at avgerðirnar í málinum skulu verða rættar í mun til lógir og kunngerðir. Afturat hesum skal borgarin kunnast um, at avgerðirnar í einum máli kunnu kærast og hvørji rættindi borgarin hevur í hesum sambandi. Viðurskiftini viðvíkjandi rættartrygdini fevna sostatt um spurningin um *mannagongdir* og *avgerðir*. Hetta viðurskifti, sum seta krøv umsitingarliga orku og førleika (Myrvold, 2001: 56-58).

*Kommunala skipanin og spurningurin um kommunusamanlegging*

Spurningurin um kommunala umsiting av málsøkjum verður eisini viðgjørdur í álitinum um uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur (Løgmansskrivsstovan, 2001). Í álitinum verður mælt til, at fleiri uppgávur verða lagdar út til kommunurnar at umsita. Verða tilmælini í hesum áliti tikin til eftirtektar og sett í verk politiskt, so verða krøvini til kommunurnar og kommunalu umsitingarnar munandi størri í komandi árum. Harumframt verður í álitinum víst á, at uppgávur, sum verða lagdar til kommunurnar,

skulu kommunurnar verða førar fyri at loysa sjálvstøðugt ella í samstarvi við aðrar kommunur í nærøkinum (Løgmansskrivstovan, 2001: 84). Hetta fer eisini at føra við sær, at spurningarnir um størri kommunalar eindir og víðkað kommunalt samstarv gerast meiri áhugaverdur enn nakrantíð fyrr.

Spurningurin um kommunusamanlegging hevur fingið drúgva viðgerð í politiska kjakinum í Føroyum, serliga eftir at sokallaða Kommunuálitið (Frágreiðing um kommunurnar í Føroyum) varð givið út í 1997 og 1998. Men hóast spurningurin um kommunusamanlegging hevur verið afturvendandi í kjakinum um kommunalu skipanina, so eru kommunalu eindirnar, við fáum undantøkum, tær somu sum fyrst í 1970'unum[6]. Somuleiðis er ein stórur partur av kommunum í Føroyum ímóti kommunusamanlegging (Holm og Mortensen, 2001: 23). Tó tykist hugburðurin mótvegis kommunusamanlegging nakað broyttur seinasta árið. Eitt nú avgjørdu Runavíkar og Skála kommunur við árslok 2001 at leggja saman[7], umframt at Hósvíkar Kommuna í januar 2002 samtykti at spyrja Sunda Kommunu um samanlegging (Sosialurin, 26. jan. 2002). Somuleiðis hevur borgarstjórin í Kirkjubøar Kommunu víst á, at soleiðis sum gongdin er nú, so er tað bara er ein spurningur um tíð, áðrenn Kirkjubøar Kommuna leggur saman við Tórshavnar Kommunu (Sosialurin, 26. jan. 2002).

Eins og í Føroyum hevur spurningurin um kommunusamanlegging eisini verið viðgjørdur í Íslandi, har tað hevur verið stór mótstøða ímóti tvungnari kommunu samanlegging. Hetta varð eisini staðfest á eini fólkaatkvøðu í 1993 (Eythórsson, 1998: 85). Mótstøðan ímóti tvungnari kommunusamanlegging førdi við sær, at íslendska stjórnin fór undir at broyta uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur. Hendan broyting førdi við sær, at fleiri stór málsøki vórðu flutt til kommunurnar at umsita, m.a. fólkaskúlin, við tí úrsliti, at fleiri kommunur sjálvbodnar løgdu saman, tí tær megnaðu ikki einsamallar at umsita hesi málsøki (Eythórsson, 1998: 99-111 og Lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging, 2001: Skjal B1).

Sum nevnt verður tað eisini í Føroyum lagt upp til at flyta fleiri málsøki frá landsmyndugleikunum til kommunurnar at umsita. Spurningurin er, um hesar broytingar í

uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur eins og í Íslandi fara at føra við sær fleiri kommunusamanleggingar í Føroyum?[8]

Orsøkirnar til mótstøðuna ímóti kommunusamanlegging í Føroyum eru fleiri (Holm og Mortensen, 2001). Eitt nú er tað óttin fyri at missa ræðið og ræðisrættin yvir viðurskiftum í egnari bygd/kommunu, og harumframt óttin fyri, at viðurskifti á staðnum ikki verða røkt nøktandi av nýggju kommununi. Hartil kemur tann fíggjarligi spurningurin og mótstøðan ímóti at yvirtaka skuld hjá øðrum skuldarbundnum kommunum. Umframt hetta hevur orðaskiftið um tvungna kommunusamanlegging til tíðir verið hart, kanska tí tvungin kommunusamanlegging hevur verið løgd fram sum einasta møguliga loysn uppá verandi trupulleikar í kommunalu skipanini. Hetta tykist eisini hava ført við sær, at áhugi ikki hevur verður vístur øðrum skipanum, sum longu eru settar í verk og sum í dag eru partur av kommunalu skipanini. Ein av hesum skipanum er kommunalt samstarv.

### *Kommunalt samstarv í Føroyum*

Flest allar kommunur í Føroyum eru partur av einhvørjum kommunalum samstarvi. Hettar er til dømis galdandi fyri samstarv millum grannakommunur um skúla, brunaumsjón og eldrarøkt. Harumframt hava allar kommunur verið partur av einum landsfevnandi kommunalum samstarvi viðvíkjandi innsavnan av ruski[9] og veitan av ravmagni hetta gjøgnum feløgini IRF og SEV, sum kommunurnar eiga.

Afturat hesum hava kommunurnar í Vágoynni síðan mitt í 1950'unum havt eitt kommunalt samstarv í oynni, har samstarvað hevur verið um mál, ið hava felags áhuga fyri allar kommunur, t.d. eldrarøkt og Vágatunnilin. Tað mest umfatandi kommunala samstarvið í Føroyum er Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum[10], sum í meiri enn 10 ár hevur umsitið fleiri týðandi kommunal viðurskifti fyri kommunur í Sundalagnum og har um leiðir. Tá ið hugsað verður um, at fleiri uppgávur og ábyrgdir í komandi árum helst verða latnar kommununum at umsita (smbr. álitið um uppgávu og ábyrgdarbýti millum land og kommunur (Løgmansskrivstovan, 2001)), og at tað harumframt verður latið upp fyri tí møguleika, at hesar kommunalu uppgávurnar kunnu loysast í samstarvi millum fleiri kommunur, so er náturligt at hyggja nærri at royndunum, sum gjørdar eru

innan kommunalt samstarv, herundir royndunum frá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum.

## Háttalag

Ritið er grundað á samrøður við fólk, ið á einhvønn hátt eru knýtt at Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum. Hesar samrøður fevna um samrøður við limir í stýrinum fyri Kommunufelagsskapin, umframt nevndarlimir í undirnevndum í Kommunufelagsskapinum. Hartil eru samrøður gjørdar við skrivaran hjá Kommunufelagsskapinum, og við fólk í limakommunum í Kommunufelagsskapinum. Í triðja lagi hevur verið samskift við umsitingina hjá Kommunufelagsskapinum, umframt at samskift hevur verið við tær einstøku kommunurnar, ið eru limir í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum.

Afturat hesum eru samrøður gjørdar við Kommunudeildina á Løgmansskrivstovuni, sum hevur eftirlit við kommunustýrunum og kommunalu umsitingunum.

## Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum

Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum varð stovnaður í 1985 og fevnir um samstarv millum fimm kommunur, har tað við árslok 2001 búðu tilsamans 1412 fólk (Hagstova Føroya, 2002). Allar kommunurnar, undantikið Gjáar Kommuna, eru í Sundalagnum.






| | |
|---|---|
| Gjáar Kommuna | 59 fólk |
| Haldórsvíkar Kommuna | 259 fólk |
| Hósvíkar Kommuna | 266 fólk |
| Hvalvíkar Kommuna | 363 fólk |
| Sunda Kommuna | 465 fólk |
| **Tilsamans** | **1412 fólk** |

(Hagstova Føroya, 2002)

**Kort 1. Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum**[III]

Áðrenn Kommunufelagsskapurin varð stovnaður, høvdu limakommunurnar í Kommunufelagsskapinum saman við Eiðis, Kollafjarðar[11] og Saksunar kommunum havt samstarv um framhaldsskúla[12]. Hetta samstarv byrjaði í 1971. Tey bæði fyrstu árini helt skúlin til í hølum hjá Sunda Kommunu, meðan nýggjur felagsskúli varð bygdur á Oyrarbakka. Felagsskúlin varð tikin í nýtslu í 1973, sama ár, sum brúgvin um Streymin varð latin upp.

Brúgvin um Streymin hevur uttan iva havt stóra ávirkan á, hvussu samstarvið millum kommunurnar hevur virkað, tí við føstum sambandi um Sundalagið gjørdist tað nógv léttari og hógligari at ferðast um sundið, umframt at ferðingartíðin millum kommunurnar varð stytt. Samstarvið um felagsskúlan og fasta sambandið um Sundalagið var eisini orsøkin til, at kjakið um økt kommunalt samstarv í Sundalagnum

[III] Gjáar Kommuna liggur partvíst við bygdina Gjógv og partvíst við Funningsfjørð.

byrjaði. Hetta kjakið tók seg upp longu miðskeiðis í 1970'unum, men hóast hetta varð Kommunufelagsskapurin ikki stovnaður fyrr enn 10 ár seinni, í 1985.

### *Byrjanin: Felags teknistovu og heilsu- og heimarøkt*

Fyrsta stigið í stovnanini av Kommunufelagsskapinum var, at Haldórsvíkar, Hósvíkar, Hvalvíkar og Sunda kommunur í 1985 settu á stovn eina teknistovu og settu verkfrøðing í starv. Umframt hetta varð heilsu- og heimarøktin eisini skipað av Kommunufelagsskapinum og undir somu lon sum teknistovan. Tey fyrstu árini hevði Kommunufelagsskapurin skrivstovu á kommunuskrivsstovuni hjá Hvalvíkar Kommunu. Seinni, í 1987, varð skrivstovan flutt á Oyrarbakka, í kommunuskrivsstovuna hjá Sunda Kommunu.

Í eini samrøðu greiðir Jóhan Petur Petersen, fyrrverandi skrivari hjá Kommunufelagsskapinum, frá, at høvuðsorsøkin til at kommunurnar settu á stovn eina teknistovu var, at tær frammanundan brúktu ymiskar privatar verkfrøðingar í Tórshavn. Hendan skipan varð ein fíggjarliga tung skipan, og harumframt høvdu hesir verkfrøðingar eisini aðrar kundar og sostatt eisini onnur áhugamál at røkja. Tí varð gjørt av at seta egnan verkfrøðing, sum bara skuldi røkja áhugamál hjá limakommununum í Kommunufelagsskapinum.

### *Umsiting sett á stovn í 1987*

Umframt teknistovuna, so var upprunaliga eisini ætlanin, at ein av uppgávunum hjá Kommunufelagsskapinum skuldi vera at standa fyri skrivstovuhaldi og bókhaldi hjá teimum einstøku kommununum. Hetta varð kortini ikki gjøgnumført sum ætlað. Til dømis er bókhaldið ongantíð vorðið partur av samstarvinum, og er hetta somuleiðis galdandi fyri stórar partar av skrivstovuhaldinum, sum enn er hjá hvørjari kommunu sær.

Í 1987 varð tó ein lítil umsiting stovnað og skrivari settur. Jóhan Petur Petersen[13], sum frammanundan varð skrivari hjá Sunda Kommunu, varð settur sum skrivari, og var hann skrivari hjá bæði Sunda Kommunu og Kommunufelagsskapinum. Tey fyrstu árini var einans talan um eitt parttíðar starv í 10 tímar um vikuna. Seinni varð hetta víðkað til

hálv-tíðarstarv, og tá ið nýggjur skrivari varð settur í 2001, eftir at Jóhan Petur Petersen fór frá vegna aldur, varð skrivarastarvið broytt til fulltíðarstarv.

Nýggi skrivarin í Kommunufelagsskapinum, Jens Marius Dalsgaard, er universitetsútbúgvin (sosiologur) og hevur drúgvar royndir í kommanalum høpi[14]. Umframt at vera skrivari hjá Kommunufelagsskapinum, so virkar hann eisini sum ráðgevi hjá teirri einstøku limakommununi, sum flestar bara hava parttíðar skrivara.

## *Felags brunaumsjón í 1987*

Í 1987 varð samstarvið í Kommunufelagsskapinum víðkað, við tað at felags brunaumsjón varð sett á stovn og ein nevnd sett at umsita og skipa hesi viðurskifti. Hetta førdi við sær, at øll brandútgerð í økinum, sum kommunurnar tá áttu, varð kannað og virðismett og síðani yvirtikin av Kommunufelagsskapinum grundað á hesa meting. Har tørvur var á tí, varð nýggj útgerð keypt. Harumframt vóru nýggir brandpostar settir upp, soleiðis at øll hús í økinum kundu røkkast. Eisini varð skipað soleiðis fyri, at sløkkiliðið hjá Kommunufelagsskapinum varð mannað við útbúnum sløkkiliðsfólk úr øllum limakommununum. Sløkkiliðið hevur tíggju venjingar um árið.

Í 1988 keypti Kommunufelagsskapurin ein sløkkibil og bøtti hetta munandi um brunatrygdin í økinum. Frammanundan vóru bara pumpur í einstøkum bygdum, men í somu atløgu varð hetta eisini broytt, soleiðis at pumpur nú komu at vera í øllum bygdum, undantikið bygdunum beint við brúnna um Streymin, tí sløkkibilurin, sum stendur á Oyrarbakka, fevnir um hetta økið.

## *Víðkan av Kommunufelagsskapinum í 1994*

Um tað mundið, tá brunaumsjónin varð sett á stovn, byrjaði kjakið um at víðka kommunala samstarvið til eisini at umfata aðrar kommunur í Sundalagnum. Tað var eyðgivið, at Eiðis, Gjáar, Funnings og Saksunar kommunur vórðu bodnar uppí felagsskapin, og fyrispurningar vórðu settir hesum kommunum um, hvørt tær høvdu áhuga fyri at gerast limir í Kommunufelagsskapinum[15].

Tá ið saman um kom, so var tað bara Gjáar Kommuna, sum gjørdist partur av Kommunufelagsskapinum, men hetta hendi ikki fyrr enn í 1994. Sofus Johannesen, borgarstjóri í Gjáar Kommunu og formaður í Brunanevndini í Kommunufelags-skapinum, greiður í eini samrøðu frá, at Gjáar Kommuna fór uppí Kommunufelagskapin í Sundalagnum, tí man fekk fyrimunir av tí. Framhaldandi sigur Sofus Johannesen: ”Ítøkiligt júst tá, so var tað serliga orsakað av brunaumsjónini. Frammanundan riggaði brunaumsjónin við Gjógv illa, og harafturat vóru eisini dømi um, at útgerðin ikki riggaði, tá á stóð, tí hon ikki varð hildin við líka.” Tá ið Gjáar kommuna fór uppí Kommunufelagsskapin, gekk gamla sløkkiútgerðin hjá Gjáar Kommunu inn í felags-kommunalu brunaumsjónina, men hendan útgerð kundi ikki brúkast, so nýggj útgerð varð keypt ístaðin, sum allar kommunurnar rindaðu. Harumframt blivu fólk frá Gjógv eisini útbúgvin sum sløkkiliðsfólk.

Ilt er at siga hvørjar orsøkirnar vóru til at hinar kommunurnar ikki fóru uppí Kommunu-felagsskapin, men gamla stríðið millum Sunda og Eiðis kommunur kann hava spælt ein leiklut, hvat Eiðis Kommunu viðvíkur[16]. Harumframt kann tað eisini hava spælt inn, at Eiðis Kommuna er væl størri enn hinar kommunurnar, og tí óttaðist at missa ov nógv, tá ið havt varð í huga, hvussu Kommunufelagsskapurin er skipaður.

### *Teknistovan verður niðurløgd í 1993*

Tá ið búskaparkreppan byrjaði fyrst í 1990’unum vórðu flest allar kommunur í Føroyum tvungnar til at skarva burturav útreiðslunum. Fyri Kommunufelagsskapin hevði hetta við sær, at teknistovan varð niðurløgd við ársbyrjan í 1993. Teknistovan var ein munandi fíggjarligur postur hjá Kommunufelagsskapinum, og tí varð gjørt av at spara hann burtur. Hini málsøkini, ið vórðu umsitin av Kommunufelagsskapinum hildu fram sum fyrr.

### *Umhvørvisnevndin í 1995*

Í 1995 vórðu umhvørvismál eisini løgd til Kommunufelagsskapin at umsita, og ein umhvørvisnevnd stovnað. Í Umhvørvisnevndini eru fimm limir, ein úr hvørjari kommunu í Kommunufelagsskapinum.

Ein av høvuðsorsøkunum til at umhvørvismál vórðu løgd undir Kommunufelagsskapin var nýggja umhvørvislógin, sum kom í 1988. Umhvørvislógin álegði kommununum at halda nógvar nýggjar reglur og at røkja nógvar uppgávur á umhvørvisøkinum, og hetta hevur ført við sær størri arbeiðsbyrðu fyri kommunurnar. Hartil hevur tað í fleiri førum verið neyðugt at keypa serkøna hjálp uttaneftir, soleiðis at krøvini í umhvørvislógini kunnu verða lokin. Ásannandi, at trupult fór at verða hjá einstøku kommununum í Kommunufelagskapinum at fylgja nýggju umhvørvislógini, so varð gjørt av, at hetta málsøkið skuldi umsitast av Kommunufelagsskapinum. Formaður í umhvørvisnevndini í Kommunufelagsskapinum, Jógvan Mørkøre, sum eisini er borgarstjóri í Hósvíkar Kommunu, greiðir í eini samrøðu frá, at umhvørvisnevndin varð stovnað, tí kommunurnar sjálvar ynsktu at taka ábyrgduna av og loysa uppgávurnar innan hetta økið, ístaðin fyri at nógvar avgerðir á umhvørvisøkinum blivu tiknar á Heilsufrøðisligu Starvsstovuni.

Í dag verða øll umhvørvismál, sum sambært umhvørvislógini skulu umsitast av kommununum, umsitin av Kommunufelagsskapinum (sí eisini Umhvørvislógin 1988). Jógvan Mørkøre greiðir frá, at øll nýggj mál verða avgreidd sambært galdandi lóg, og felagsskapurin hevur sett sær fyri, at onnur, eldri mál so við og við verða fingin í rættlag, so at tey eisini lúka krøvini í umhvørvislógini. Umhvørvisnevndin viðger øll mál, ið skrivliga verða kærd til umhvørvisnevndina, umframt at nevndin sjálv eisini tekur mál til viðgerðar.

Málsviðgerðin í umhvørvisnevndini er soleiðis skipað, at tá ið eitt mál verður viðgjørt, sum t.d. er um viðurskifti í Hósvík, so er limurin hjá Hósvíkar Kommunu ógegnigur og kann ikki luttaka í málsviðgerðini. Hendan skipanin er gjørd fyri at tryggja eina rættvísa og óhefta málsviðgerð. Harumframt verða allir partar í einum máli kunnaðir um hvørji rættindi teir hava viðvíkjandi kærum av avgerðum, ið umhvørvisnevndin tekur.

### *Felags tannarøkt í 1996*

Í 1996 varð tannarøkt eisini flutt til Kommunufelagsskapin at umsita, og eftir hetta varð avtala gjørd við tannlæknan í Hvalvík, har tannarøktin eisini heldur til. Skipanin varð

fyrst gjørd sum ein royndarskipan í fimm ár, og í 2001 varð skipanin gjørd til eina varandi skipan. Áðrenn hetta høvdu kommunurnar hvør sær tannarøktina um hendi. Sambært fyrrverandi skrivaran hjá Kommunufelagsskapinum, Jóhan Petur Petersen, var hetta ein dýr skipan í mun til núverandi skipan, sum eisini umfatar kostnað til sertannlæknar. Ein annar trupulleiki við gomlu skipanunum var, at tær, smbr. tannlæknunum, ikki góvu nóg góða effekt, tí tær vóru ov illa skipaðar, greiður Jóhan Petur Petersen frá.

Tannarøktin verður fíggjað á tann hátt, at hvør kommuna í Kommunufelagsskapinum rindar í mun til talið av børnum í kommununi (Kommununevndin, 1998a: 173).

### *Ein kommunulækni afturat í læknadøminum í 2001*

Umframt tannarøkt, so hevur Kommunufelagsskapurin eisini arbeitt við at bøta um læknaviðurskiftini í økinum, sum er partur av Eiðis læknadømi. Fram til 2001 hevur bara ein lækni verið í Eiðis læknadømi, men í 2001 bleiv hetta broytt. Tørvurin á einum lækna afturat hevur verið vaksandi, og millum onnur hevur Kommunufelagsskapurin arbeitt miðvíst fyri at fáa ein lækna settan afturat í læknadøminum. Í 2001 gav arbeiðið úrslit, tá ið Heilsumálastýrið gjørdi av at seta ein lækna afturat í læknadøminum. Higartil hevur annar læknin hildið til Eiði, meðan tann nýggi læknin ætlandi skal halda til á Oyrarbakka. Talan er um læknahølini, sum frammanundan hava verið brúkt av Eiðis-læknanum, tá ið hann hevur havt læknaviðtalu á Oyrarbakka; tað er Kommunufelagsskapurin, sum hevur gjørt tey út.

### *Ellis- og røktarheim í 2002*

Norðari partur av Streymoy og norðari partur av Eysturoy eru einasta øki í Føroyum, har onki ellis- og røktarheim er (Sosialurin, 20. desember 2000). Higartil hava kommunurnar gjørt avtalur um pláss á øðrum ellis og røktarheimum í Stremoy og Eysturoy[17]. Hinvegin er tørvurin á ellis- og røktarheimsplássum vorðin alsamt størri hesi seinastu árini, m.a. tí at parturin av eldri fólkum í Føroyum er vaksin.

Kommunufelagsskapurin staðfesti vaksandi tørvin og avgjørdi at fara undir ætlanir um nýtt ellis- og røktarheim. Kommunufelagsskapurin hevur lagt pengar til síðis til endamálið og átti við árslok 2001 umleið 2,5 mió. kr. á bók; harumframt eru 2 mió. kr. settar av á fíggjarætlanini hjá Kommunufelagsskapinum fyri 2002.

Í 2001 vóru tekningar og aðrar fyrireikingar lidnar, men nakað av ósemju var tó um, hvar ellis- og røktarheimið skuldi byggjast, tí fleiri kommunur ynskti, at heimið skuldi byggjast í teirra kommunu. Úrslitið av hesari ósemju varð, at avgjørt varð, at ellis- og røktarheimið skal byggjast í Streymnesi í Hvalvíkar Kommunu.

Í Føroyum hevur verið siðvenja, at landið hevur rindað 90% av íløgunum í ellis og røktarheim og kommunurnar 10%. Hendan siðvenja varð broytt í 2001, tá ið ein nýggj lóg um studningslán til ellis- og røktarheim varð samtykt í løgtinginum (Uppskot til løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim í Norðurstreymoy, 2001). Tann nýggja lógin gevur rentu- og avdráttarfrítt studningslán til ný- ella umbygging av ognum, sum skulu nýtast til ellis- og røktarheim. Studningslánið er í mesta lagi kr. 500.000 fyri hvørt røktarheimspláss á heiminum, tó ongantíð meiri enn helvtina av byggikostnaðinum (Løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim, 2001). Sambært galdandi lóg ber landið allan kostnaðin av rakstrinum av ellis- og røktarheimum, men hendan lóg er undir endurskoðan í sambandi við ætlaninar um at broyta ábyrgdarbýtið millum land og kommunu. Landið hevur játtað at stuðla byggingini av ellis- og røktarheiminum í Hvalvík við heimild í nevndu lóg. Fyri Kommunufelagsskapin hevur hetta við sær, at hann kemur at rinda í minsta lagi helvtina av teimum 28 mio. kr., ið ellis- og røktarheimið er mett at kosta. Ætlandi verður farið undir at byggja ellis- og røktarheimið í 2002, men sambært Jens Marius Dalsgaard, skrivara í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, so var hettar ikki endaliga avgjørt í februar 2002.

### *Bygnaður*

Omanfyri eru virkisøkini hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum lýst. Í hesum partinum verður hugt nærri at bygnaðinum í Kommunufelagsskapurin.

Kommunufelagsskapurin er skipaður við einum stýri, tveimum undirnevndum og eini umsiting. Sambært reglugerðini fyri Kommunufelagsskapin í Sundalagnum, so hevur hvør limakommuna tveir limir í stýrinum í Kommunufelagsskapinum (Reglugerð fyri Kommunufelagsskapin í Sundalagnum, 2000: § 7). Hesir eru valdir millum fólkavaldu limirnar í teirri einstøku kommununi, og verða valdir fyri fýra ár í senn, samsvarandi valskeiðinum fyri kommunuvalið.

Stýrið í Kommunufelagsskapinum hevur ein fastan fund um mánaðin.




*Bygnaður av Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum.*

At allar kommunur í Kommunufelagsskapinum hava sama tal av limum í stýrinum fyri Kommunufelagsskapin er til fyrimuns fyri tær smærru kommunurnar. Tað vil siga, at Gjáar Kommuna, tann minsta í Kommunufelagsskapinum, við einans 4% av íbúgvunum í Kommunufelagsskapinum, hevur líka nógvar limir og atkvøður sum Sunda Kommuna, har ein triðingur av fólkinum í Kommunufelagsskapinum býr.

Sambært reglugerðini fyri Kommunufelagsskapin, so kann stýrið seta undirnevndir at skipa viðurskifti innan ymisk øki (Reglugerð fyri Kommunufelagsskapin í Sundalagnum, 2000: § 10). Tvær slíkar nevndir eru settar: Umhvørvisnevndin og brunanevndin. Hesar nevndir eru skipaðar á sama hátt sum stýrið fyri Kommunufelagsskapin, tó hava limakommunurnar bara ein lim í undirnevndunum, í mun til tveir í stýrinum (Kommununevndin, 1998a: 173). Limirnir í undirnevndunum eru somuleiðis valdir millum fólkavaldu kommunustýrislimirnir í teirri einstøku kommununi. Jóhan Petur Petersen, fyrrverandi skrivari í Kommunufelagsskapinum, greiðir í eini samrøðu frá, at tað javna býtið av limum í stýrinum og nevndunum hevur gjørt, at arbeiðið hevur gingið væl. Sofus Johannesen, borgarstjóri í Gjáar Kommunu, vísti eisini á, at tað var av

avgerandi týdningi, at hvør limakommuna hevði sama tal av limum í stýrinum og nevndunum.

Avgerðir í bæði stýrinum og undirnevndunum verða tiknar við vanligum meiriluta. Áðrenn reglugerðin fyri Kommunufelagsskapin í Sundalagnum varð broytt í 2000, hevði hvør kommuna sýtingarrætt (veto) í stýrinum.

*Víðkan av samstarvinum*

Í reglugerðini fyri Kommunufelagsskapin verður latið upp fyri møguleikanum at víðka um talið av limakommunum í Kommunufelagsskapinum. Í reglugerðini er kortini tann avmarking, at samstarvið bara kann víðkast til kommunur í Sundalagnum. Harumframt er tað eisini eitt krav, at limakommunurnar góðtaka víðkanina.

Umframt at sjálvt samstarvið kann víðkast til at umfata fleiri kommunur í Sundalagnum, so eru í reglugerðin eisini møguleikar fyri, at samstarvið kann víðkast til onnur málsøki. Víst verður í reglugerðini á, at hesi øki kunnu millum annað verða (Reglugerð fyri Kommunufelagsskapin í Sundalagnum, 2000: § 10.):

- býarskipanarmál
- heilsu- og almannamál
- skúla- og mentamál
- teknisk mál
- vinnumál

Sum nevnt, so verða brunatrygd og umhvørvismál í dag skipaði av Kommunufelagsskapinum, umframt ávís heilsu- og almannamál.

*Uppsøgn av limaskapinum í Kommunufelagsskapinum*

Um ein kommuna er misnøgd við samstarvið í Kommunufelagsskapinum og vil sleppa burturúr samstarvinum, so eru reglur fyri hesum í reglugerðini fyri felagsskapin. Í § 3 stendur, at ein limakommuna kann skrivliga siga seg úr Kommunufelagsskapinum við 6 mánaða freist til ein 1. januar. Tá ið ein limakommuna sigur seg úr

Kommunufelagsskapinum, so sigur hon samstundis frá sær medognarrættin til ognirnar hjá felagsskapinum (Reglugerð fyri Kommunufelagsskapin í Sundalagnum, 2000: § 3). Enn hevur ongin kommuna í Kommunufelagsskapinum brúkt hendan møguleikan.

### *Fígging*

Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum verður fíggjaður av limakommununum, sum rinda í mun til fólkatalið í teirri einstøku kommununi[18]. Á summum økjum hevur hetta verið ein stórur fyrimunur fyri tær smærru kommunurnar, ít tær hava fingið atgongd til útgerð og umstøður, sum tær neyvan høvdu havt ráð til at útvega sjálvar. Hetta hevur millum annað verið galdandi fyri viðurskifti viðvíkjandi brunatrygd.

Fíggjarætlanin fyri Kommunufelagsskapin verður samtykt á árliga aðalfundinum hjá Kommunufelagsskapinum. Aðalfundurin hevur hægsta vald í felagsskapinum, og allar avgerðir, sum kunnu hava beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri limakommunurnar, krevja einamælta aðalfundarsamtykt. Tó kunnu partar av felagsskapinum taka avgerðir, sum bert hava við sær fíggjarligar avleiðingar fyri tær limakommunurnar, sum taka undir við avgerðini (Reglugerð fyri Kommunufelagsskapin í Sundalagnum, 2000: § 9). Áðrenn avgerðir, sum beinleiðis binda kommunurnar fíggjarliga, koma í gildi, skulu tær samtykjast av kommunustýrinum í limakommununum. Hetta tryggjar, at allir kommunustýrislimir í teirri einstøku kommununi eru kunnaðir um avgerðir, ið tiknar verða á aðalfundinum hjá Kommunufelagsskapinum. Harumframt tryggjar hetta, at tann einstaka kommunan ikki kann bindast fíggjarliga uttan at kommunustýri hevur samtykt tað.

Fíggjarætlanin fyri Kommunufelagsskapin fyri árið 2001 var umleið 3,2 mio. kr. og tað er meiri enn 1,5 mió. kr. hægri enn fíggjarætlanin fyri árið 1999. Høvuðsorsøkin til hesa hækking eru ætlaninar um at byggja ellis- og røktarheim, sum farið verður undir í 2002.

## Kommunufelagsskapurin umsitur stór málsøki

Í undanfarna parti varð víst á, hvørji málsøkið, kommunurnar í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum samstarva um í Kommunufelagsskaps høpi. Um hesi samstarv í Kommunufelagsskapinum verða samanborin við yvirlit yvir hvørjar uppgávur komm-

ununum er heimilað at umsita (sí yvirlit á síðu 5 og 6), so kann sigast at Kommunufelagsskapurin umsitur stórir partar av viðurskiftunum á umhvørvisøkinum og tilbúgvingarøkinum. Harumframt umsitur Kommunufelagsskapurin ávísar partar av málsøkjum, íð viðkoma persónligu viðurskiftunum hjá borgarunum, t.d. heilsurøkt, heimarøkt og eldrarøkt.

Um hugt verður nærri at, hvørji hesi øki eru í mun til tey málsøkini, ið kommunurnar sum heild umsita og hava heimild at umsita, so umsitur Kommunufelagsskapurin týðandi mál og kann samstarvið í Kommunufelagsskapinum metast at verða umfatandi. Tað eru bara málsøkini innan frítíðarviðurskifti og handilsliga og vinnuliga menning, ið als ikki verða umsitin av Kommunufelagsskapinum.

Verður Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum samanborin við tær størstu kommunurnar í Føroyum, so eru tað nøkur stór málsøki, ið kommunur umsita, sum ikki verður umsitin av Kommunufelagsskapin. Hetta er millum annað galdandi fyri partar av skúlamálum og almannamálum. Hvat viðvíkur skúlamálum, so skipa flest allar kommunur í landinum *sjálvar* lokalan barnaskúla, og er hetta eisini galdandi fyri kommunurnar, sum eru í Kommunufelagsskapinum. Hartil skipað tær størru kommunurnar í landinum framhaldsskúla, umframt at framhaldsskúli í ávísum pørtum av landinum verður skipaður av kommunum í felag. Hetta seinna er galdandi fyri kommunurnar í Kommunufelagsskapinum, sum saman við Eiðis og Saksunar kommunum eru í felag um framhaldsskúla á Felagsskúlan á Oyrarbakka.

Hvat viðvíkur almannamálum, so eru tað bara tær báðar størstu kommunurnar í Føroyum (Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur), sum umsita partar av forsorgarmálunum og sum hava eina beinleiðis almannadeild. Galdandi fyri allar hinar kommunurnar er, at Almannastovan umsitur almannamál fyri kommunurnar, sum so rinda Almannastovuni fyri partar av hesari tænastu eftir einum ávísum býtislykli. Almannastovan hevur í hesum sambandi, umframt høvuðsskrivstovuna í Tórshavn, økisdeildir í Suðuroynni, Eysturoynni og Norðoyggjum.

## Lærutilgongdin við Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum

Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum hevur umleið 17 ár á baki. Í hesum tíðarskeiði hava limakommunurnar verið gjøgnum eina lærutilgongd, sum hevur skapt og tillagað Kommunufelagsskapin til tað, hann er í dag. Árini undan stovningini av Kommunufelagsskapin tykjast eisini hava spælt ein týdningarmiklan leiklut fyri Kommunufelagsskapin og fyri hvussu samstarvið hevur virkað.

### *1971-1985: Árini áðrenn Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum varð stovnaður*

Tað eru tvey viðurskifti í tíðarskeiðinum áðrenn Kommunufelagsskapurin varð stovnaður, sum eru av týdningi fyri, hvussu samstarvið í Kommunufelagsskapin hevur virkað. Hesi viðurskifti hava bæði við felagsskúlan á Oyrarbakka at gera.

Fyrst er sjálvt samstarvið um felags framhaldsskúla, sum byrjaði í 1971. Hetta samstarv førdi við sær, at ein nýggjur skúli varð bygdur á Oyrarbakka, sum varð tikin í nýtslu í 1973. Sostatt høvdu kommunurnar, sum í 1985 skipaðu Kommunufelagsskapin, meiri enn 10 ára royndir við samstarvi sínámillum á skúlaøkinum. Samstarvið um framhaldsskúla var sostatt við til at skapa grundarlag fyri einum víðkaðum kommunalum samstarvi. Jóhan Petur Petersen, fyrrverandi skrivari í Kommunufelagsskapinum, sigur í eini samrøðu, at royndirnar við samstarvi um framhaldsskúla høvdu stóran týdning fyri at tað yvirhøvur bar til at skapa eitt víðkað, skipað kommunalt samstarv.

Harnæst hevur tað eisini havt týdning, at stórur partur av verandi kommunustýrislimum í økinum hava gingið í framhaldsskúla í Felagsskúlanum á Oyrarbakka og tískil kenna hvønn annan frá skúlatíðini har[19].

### *1985-2002: Árini meðan Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum hevur virkað*

Nógv bendir á, at tað samstarvið, sum var í tíðarskeiðinum áðrenn Kommunufelagsskapurin varð stovnaður hevur havt stóran týdning fyri, hvussu Kommunufelagsskapurin hevur virkað. Men sjálvur hátturin, ið Kommunufelagsskapurin er skipaður eftir,

hevur eisini havt alstóran týdning. Serliga er hetta galdandi fyri býtið av limum og atkvøðum í stýrinum og undirnevndunum í Kommunufelagsskapinum. Við tað at allar limakommunur – uttan mun til fólkatal – hava líka nógvar limir og líka nógvar atkvøður í stýrinum og undirnevndunum, so slepst undan at tær størru kommunurnar hava alt valdið í Kommunufelagsskapinum. Júst hendan trupulleikan hava fleiri smærri kommunur víst á sum størstu forðing fyri at tær vilja leggja saman við størri kommunum (Holm og Mortensen, 2001)[20].

Millum onnur viðurskifti, sum stýrislimir vístu á hava havt týdning fyri samstarvið í Kommunufelagsskapinum, er, at limirnar og limakommunurnar hava verið opnar fyri tí at læra at samstarva. Sambært Jóhan Petur Petersen, fyrrverandi skrivara hjá Kommunufelagsskapinum, vóru limirnar í stýrinum og undirnevndunum sera varnir í byrjanini, og var tað kanska gjørt eitt sindur burturúr at seta spurnartekin við, hvat lá aftanfyri tær ætlanir, sum vórðu lagdar fram av øðrum limum enn einum sjálvum. Men í dag er hetta fullkomiliga broytt og virkar Kommunufelagsskapurin í dag (2001) í stóran mun sum ein vanlig kommuna, sigur Jóhan Petur Petersen. Breið semja er eisini millum stýrislimirnir í Kommunufelagsskapinum um, at tað hevur havt týdning, at hugburðurin mótvegis tí at samstarva hevur verið líkur millum stýrislimirnir.

Eitt triðja, ið hevur havt stóran týdning fyri samstarvið í Kommunufelagsskapinum, eru málsøkini, ið eru flutt til Kommunufelagsskapin at umsita. Sum heild hava allar limakommunur havt fyrimun av, at hesi málsøki eru flutt frá teirri einstøku kommunu til Kommunufelagsskapin at umsita. Hóast summar limakommunur hava fingið størri fyrimun av hesum broytingum enn aðrar, so hevur hetta ikki ført við sær ósemjur millum kommunurnar, tí heildarmyndin hevur verið tann, at allar limakommunur við broytingunum kunnu bjóða betri tænastur. Hetta merkir tó ikki, at ongar ósemjur hava verið, tí smærri ósemjur hava verið um ymisk mál. Til dømis tá læknahølini vórðu flutt úr Hvalvík á Oyrarbakka í 1995, ein avgerð, sum kommunustýrislimir í Hvalvík vóru ímóti og ónøgdir við. Eitt annað dømi er viðvíkjandi spurninginum um, hvar ellis og røktarheimið, sum verður bygt í næstum, skal byggjast. Bæði Hósvíkar og Hvalvíkar kommunur bjóðaðu seg fram og ynsktu, at ellis- og røktarheimið skuldi byggjast í teirra kommunu, við Áirnar í Hósvíkar Kommunu og í Streymnesi í Hvalvíkar Kommunu.

Úrslitið var sum áður nevnt, at avgerð varð tikin um at byggja ellis- og røktarheimið í Streymnesi í Hvalvíkar Kommunu.

Tað, at partarnir tora at sleppa egnum krøvum til fyrimuns fyri heildina er júst styrkin við einum samstarvi. Hugsandi er, at um ikki annar parturin slepti kravinum um, at ellis- og røktarheimið skuldi byggjast í teirra kommunu, so hevði onki ellis- og røktarheim verið bygt. Fyri framtíðarsamstarvið er tað eisini ein styrki, at ein siðvenju er fyri, hvat liggur í tí at samstarva.

## Kommunufelagsskapurin og trupulleikar hjá smærri kommunum

Í kjakinum um kommunaluskipanina í Føroyum (sí eisini omanfyri) hevur verið víst á, at tær smærru kommunurnar hava ávísar trupulleikar viðvíkjandi:

- vantandi umsitingarligari orku
- vantandi fíggjarligari orku
- rættartrygd, serliga viðv. spurninginum um ógegnið (Kommununevndin, 1996; 1998a; 1998b)

Hesin parturin av arbeiðsritinum er eitt kjak um í hvønn mun Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum kann sigast verða ein loysn uppá nevndu trupulleikar í limakommunum og – í einum almennum høpi – um kommunalt samstarv sum heild kann sigast vera ein gongd leið hjá smærri kommunum.

### *Umsitingarlig og fíggjarlig orka*

Vantandi umsitingarlig orka og førleiki er og hevur verið ein trupulleiki í nógvum smáum kommunum. Eins og víst hevur verið á omanfyri, so megna nógvar smærri kommunur ikki sjálvar at loysa tær uppgávur, sum tær sambært galdandi lóg skulu loysa, og verða tær í slíkum førum antin loystar av landsstovnum ella als ikki loystar.

Spurningurin um vantandi fíggjarliga orku og vantandi umsitingarliga orku og førleika hevur verið nógv viðgjørdur í samband við kjakið um størri kommunalar eindir. Kommunusamanlegging kann í prinsippinum vera við til at styrkja um kommunalu umsitingina. Men útbreiddi ivin og mótstøðan mótvegis kommunusamanlegging kann tulkast sum, at nógvar kommunur ikki meta fyrimunirnar viðvíkjandi umsitingarligari orku og førleika at verða nóg stórar til at leggja kommunur saman.

Ein annar møguleiki at loysa trupulleikarnir við fíggjarligari- og umsitingarligari orku er at loysa kommunalar uppgávur í felag, t.v.s. at loysa uppgávur í samstarva millum kommunur. Sum nevnt, so er samstarv millum kommunur um ymisk málsøki ikki nakað óvanligt í Føroyum, og tað mest formaliseraða kommunala samstarvið í Føroyum er samstarvið í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum.

*Brunanevndin*

Breið semja er um, at brunaumsjónin er blivin betri og hevur bøtt um trygdina í økinum, síðan hon varð flutt til Kommunufelagsskapin at umsita. Í samrøðunum varð víst á, at kommunurnar ikki einsamallar høvdu megnað at útvega slíka sløkkiútgerð og slíkan brandbil, sum Kommunufelagsskapurin hevur. Serliga hevur felags brunaumsjón verið til fyrimuns fyri tær smærru kommunurnar, ið frammanundan sum heild høvdu vánaliga sløkkiútgerð. Sostatt hevur felags fíggingin av útgerðini verið ein fyrimunur fyri tær smærru kommunurnar.

*Umhvørvisnevndin*

Samstarvið um umhvørvismál hevur verið skipað av Kommunufelagsskapinum síðan 1995. Breið semja er millum stýrislimirnir í Kommunufelagsskapinum, at umhvørvismál verða væl umsitin av umhvørvisnevndini og at tað hava verið fyrimunir við at skipa hetta í felag. Í eini samrøðu varð m.a. víst á, at heilsunevndirnar, sum vóru í hvørjari kommunu fyrr, "virkaðu kanska ikki so væl, tí forholdini blivu skjótt so smá", sum tikið varð til. Tí hevur skipanin í umhvørvisnevndin viðvíkjandi ógegni eisini havt ein týdning. Dømi eru eisini um, at áðrenn umhvørvisnevndin varð stovnað, vóru tað nøkur mál í einstøkum kommunum, har støðan var meiri ella minni fastlæst, so at siga einans orsakað av teimum smáu viðurskiftunum. Hesi mál blivu uttan størri trupulleika

loyst, tá ið umhvørvisnevndin hjá Kommunufelagsskapinum varð stovnað og yvirtók málsviðgerðina. Hartil varð í samrøðum eisini víst á, at felags umsitingin av umhvørvismálum hevur ført við sær eina meiri professionaliseraða viðgerð á hesum økinum.

*Ellis- og røktarheimi*

Samstarvið um at byggja nýtt ellis- og røktarheim í Norðstreymoy er eisini eitt dømi um, at samstarvið í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum hevur givið fyrimunir, hvat fíggjarligari orku viðvíkur. Sum so er tað ikki nakað óvanligt, at kommunur samstarva um ellis- og røtarheim, tað formaliseraða samstarvið í Kommunufelagsskapinum tykist hava gjørt tað meiri náttúrligt, at hesin felags trupulleiki varð tikin upp og loystur í Kommunufelagsskaps høpi. Siðvenjan við felags fígging av ymiskum málsøkjum tykist eisini hava ført tað við sær, at tað hevur verið nátúrligt, at ellis og røktarheimið verður bygt og fíggjað í Kommunufelagsskaps høpi.

*Felags umsiting*

Umframt at umsita felagsmálsøkið, so hevur umsitingin í Kommunufelagsskapinum eisini virkað sum ráðgevi hjá limakommununum í Kommunufelagsskapinum. Á hendan hátt er samstarvið eisini víðkað til at umfata atgongd til betri førleika, og vísti ein stýrislimur í Kommunufelagsskapinum í eini samrøðu á, at hetta verður mett sum ein styrki fyri limakommunurnar, sum flest allar bara hava parttíðar settan skrivara.

### Spurningurin um rættartrygd

Í innleiðandi partinum varð víst á, at ein av trupulleikunum við smáum kommunalum eindum er trupulleikin viðvíkjandi rættartrygdini, serliga viðvíkjandi spurninginum um ógegni. Í stuttum snýr hesin trupulleikin seg um spurningin um rættvísa og óhefta viðgerð av málum, har ein ella fleiri kommunustýrislimir verða ógegnigir orsakað av tilknýti teirri til málið og/ella til persónar ella feløg, ið knýtt eru at málinum. Hendan trupulleikan kenna kommunurnar í Sundalagnum, sum eru lutfalsliga smáar, eisini til, og av somu orsøk hava tær innan virkisøki hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum skipað seg soleiðis at ógegni ikki gerst ein trupulleiki.

Hetta er fyrst og fremst gjørt í umhvørvisnevndini. Fyri at minka um trupulleikan viðvíkjandi ógegni hevur umhvørvisnevndin gjørt eina serliga skipan í sambandi við málsviðgerð. Vanliga verður spurningurin um ógegnið mettur ítøkiliga í sambandi við hvørt einstakt mál[21]. Umhvørvisnevndin nýtir hinvegin eitt objektivt kriterium fyri ógegni: Tá ið eitt mál verður viðgjørt, sum t.d. er um viðurskifti í Hósvík, so er limurin hjá Hósvíkar Kommunu ógegnigur og kann hann ikki luttaka í málsviðgerðini. Endamálið við hesum er at tryggjað eina rættvísa og óhefta viðgerð og avgerð. Fleiri av stýrislimunum í Kommunufelagsskapinum vístu á, at tey mettu hesa skipan vera góða, og at fólk í økinum sum heild vóru nøgd við hesa skipan.

Ein onnur broyting, sum er framd við umhvørvisnevndini, er, at allir partar í einum máli verða kunnaðir sambært lógini um almenna fyrisiting um, hvørji rættindi teir hava viðvíkjandi kærum av avgerðum, ið umhvørvisnevndin tekur.

Skipanin av umhvørvisnevndini í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum og mannagongdin í sambandi við málsviðgerð er eitt dømi um, hvussu minkast kann um trupulleikanum við ógegni. Tann serstaka skipanin av umhvørvisnevndini hevur sostatt loyst ein av teimum stóru trupulleikunum, ið nógvar smærri kommunur kennast við. Í so máta hevur loysnin hjá Kommunufelagsskapinum givið borgarunum í økinum eina betri tænastu enn teir høvdu frammanundan.

Ein vansi við eini tílíkari skipan er tó, at viðgerðin av lokalum málum verður framd av einum myndugleika, sum borgarin ikki hevur beinleiðis ávirkan á, tí limurin, sum borgarar úr eini limakommunu hava valt, er ógegnigur, tá ið mál verður viðgjørd. Hinvegin verða øll mál avgreidd sambært galdandi lóg, og hevur borgarin møguleika at kæra úrskurð í málum, um ein ikki er nøgdur við lógartulkingina hjá umhvørvisnevndini. Samanborið við ta gomlu skipanina við eini heilsunevnd í hvørjari kommunu, so tykist skipanin við eini felags umhvørvisnevnd at hava við sær eina betri umsiting av málsøkinum, ið eisini gevur borgaranum eina betri tænastu. Hettar kemst fyrst og fremst orsakað av, at man hevur fingið eina vælvirkandi umhvørvisnevnd, sum hevur umsitingarligu orku og førleika til at viðgera mál.

*Ætlaðu at skipað barnaforsorgina eftir sama leisti*

Kommunufelagsskapurin hevur arbeitt við at fáa flutt barnaforsorgina í økinum til Kommunufelagsskapin at umsita. Ætlanin hevur í hesum sambandi verið at skipað barnaforsorgina eftir sama leisti sum umhvørvisnevndin er skipað, hetta serliga viðvíkjandi spurninginum um ógegni. Hesum hevur ein donsk ríkislóg, sum sigur, at ein barnaverndarnevnd skal verða í hvørjari kommunu, forðað fyri[22].

### *Kommunalt samstarv og skerd demokratisk rættindi*

Um samanborið verður við tíðarskeiðið áðrenn Kommunufelagsskapurin varð stovnaður, so tykist samstarvið innan ávís øki hava ført við sær nakrar yvirmunir fyri limakommunurnar og borgararnar í økinum. Tá ið farið verður undir at skipa kommunal viðurskifti í felagskommunalum høpi fylgja hinvegin eisini nakrir veikleikar við, og verður m.a. víst á ein teirra í Kommunuálitinum. Kommunuálitið settur m.a. spurnartekin við, hvussu demokratisk slík felagskommunal samstørv eru, við tað at veljarin ikki hevur beinleiðis ávirkan á, hvør umboðar teir í nevndunum í kommunalum samstørvum sum Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum (Kommununevndin, 1998b: 18-19). Annars verður kommunalt samstarv bara nevnt í nøkrum fáum brotum í Kommunuálitinum, hetta helst orsakað av, at álitið hevur ta støðu, at kommunalt samstarv ikki er ein loysn uppá, hvussu føroysku kommunurnar skulu skipast.

Ein av trupulleikunum við kommunalum samstarvi, ið vístur hevur verið á, er, at kommunalt samstarv førir við sær, at borgarar í eini kommunu ikki sjálvir koma at velja tey ráð, ið taka flestu og týdningarmestu avgerðirnar (Kommununevndin, 1996: 20; Kommunuálitið, 1998b: 18-19). Hetta førir við sær, at demokratisku rættindini hjá borgararnum verða skerd. Hvat samstarvinum í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum viðvíkur, so er skipanin sum nevnt tann, at bert fólkavaldir limir í kommunustýrinum í limakommununum kunnu verða limir í stýrinum og í undirnevndunum í Kommunufelagsskapinum. Sostatt vigar skipanin í Kommunufelagsskapinum í ein ávísan mun upp fyri trupulleikanum við skerdum demokratiskum rættindum. Kortini kann ógegnismannagongdin í umhvørvisnevndini í ávísan mun sigast ávirka demokratisku rættindini hjá borgaranum. Hendan skipan ger, at nevndarlimurin í t.d. Hósvík verður ógegnigur, tá ið mál úr Hósvík verða viðgjørd. Sostatt verður mál t.d.

viðvíkjandi hósvíkingum, ikki viðgjørd av kommunustýrislimum, ið tey sjálvi hava valt. Í so máta verða demokratiski rættindini hjá borgaranum formelt skerd. Hvørt missurin í skerdu demokratisku rættindini verður uppvigaður av eini betri tænastu frá eini felags umhvørvisnevnd, kann bert borgarin í limakommununum í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum taka støðu til.

### *Kommunalt samstarv kann gerast stirvið, um tað verður ov umfatandi*

Ein annar vansi við kommunalum samstarvi er, at tá ið samstarvið verður ov umfatandi, so kann tað gerast stirvið og málsviðgerðin tung, eitt nú víðvíkjandi fíggjarligum avgerðum.

Í reglugerðini fyri Kommunufelagsskapin í Sundalagnum er ávíst ein serlig skipan, hvat viðvíkur fíggjarligum avgerðum. Hendan skipan krevur, at allar avgerðir, ið hava við sær beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri limakommunurnar, krevja einmælta aðalfundar samtykt. Harnæst skulu avgerðir, sum beinleiðis binda kommunurnar fíggjarliga, samtykjast av tí einstaka kommunustýrinum áðrenn tær koma í gildið. Hendan seinna reglan er í samsvar við Kommunulógina, ið áleggur kommunustýrinum at umsita fíggjarviðurskiftini hjá kommununi, og kommunustýrið kann ikki lata øðrum hesa ábyrgd.

Í byrjanini av einum samstarvi kann ein slík skipan sum skipanin viðvíkjandi fíggjarligum avgerðum verða góð, tí hon tryggjar, at kommunurnar í samstarvinum altíð eru kunnaðar um, hvat fyriferst í samstarvinum, umframt at ongar óvæntaðar fíggjarligar bindingar verða gjørdar. Tá ið royndirnar við at samstarva yvir eitt longri tíðarskeið eru mentar og styrktar, og tá ið krøv verða um eitt meiri dynamiskt samstarv, tá kann ein tílík skipan føra við sær, at samstarvið virkar tungt og stirvið. Borgarstjórin í Hósvíkar kommunu, Jógvan Mørkøre, hevur eisini víst á, at hetta er ein av høvuðsorsøkunum til, at Hósvíkar Kommuna hevur gjørt av, at kanna møguleikarnir fyri kommunusamanlegging við Sunda Kommunu (Sosialurin, 26. jan. 2002).

## Framtíðin hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum

Kommunurnar í Kommunufelagsskapinum høvdu á sumri 2001 umrøður viðvíkjandi framtíðar samstarvinum í Kommunufelagsskapinum. Hesar umrøður viðgjørdu eisini spurningin um víðkanina av samstarvinum í Kommunufelagsskapinum. Umrøtt varð m.a., um samstarvið skuldi umfata nýggj samstarvsøki og hvørji hesi skuldi vera. Eftir sum Hósvíkar Kommuna í januar 2002 gjørdi av at spyrja seg fyri um kommunusamanlegging við Sunda Kommunu, er spurningurin um framtíðar samstarvið innan karmarnir hjá Kommunufelagsskapinum uttan iva steðgaður, um ikki annað, so fyribils. Ábendingar eru eisini um, at hinar kommunurnar í Kommunufelagsskapinum fara at umrøða spurningin um kommunusamanlegging í Sundalagnum, nú Hósvíkar Kommuna hevur tikið hendan spurningin upp.

Í løtuni - mai 2002 - er sostatt ógreitt, hvør framtíðin hjá Kommunufelagsskapinum verður. Fortreytirnar fyri kommunusamanlegging tykjast verða til staðar, eftirsum kommunurnar hava drúgvar samstarvsroyndir. Tó er greitt, at um kommunurnar leggja saman í eina kommunu, so verður nýggja kommunustýrið valt sum í einari vanligari kommunu. Hetta førir við sær, at tær smærri kommunurnar, sum í løtuni eru tryggjaðar umboðan í stýrinum í Kommunufelagsskapinum, og hartil somu umboðan sum tær størru kommunurnar í Kommunufelagsskapinum, missa trygdina fyri umboðan. Spurningurin er tí, um tær smærru kommunurnar høvdu tikið undir við at lagt saman í eina kommunu, har tær kunnu enda við at missa ta ávirkan, tær hava bæði í egnari kommunu og í Kommunufelagsskapinum? Hinvegin skal man ikki vera blindur fyri, at tað kunnu finnast útvegir, soleiðis at smærri bygdir ikki detta burtur ímillum, tá ið størri kommunalar eindir vera skipaðar. Men tá eigur hesin spurningur sjálvsagt at vera partur av sjálvum samráðingunum um kommunusamanlegging.

## Kommunalt samstarv, ein loysn?

Samstarv millum kommunur kann vera ymiskt grundað, har endamálið antin kann vera at økja um umsitingarligu orkuna, at økja um fíggjarligu orkuna, ella at veita borgaranum í økinum eina betri tænastu. Í nógvum førum er talan um eina kombinatión

av nevndu viðurskiftum, og er hetta eisini galdandi fyri samstarvið í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum.

Hetta arbeiðsrit er eitt sokallað ”casestudium”, har Kommunufelagsskapurin er ”casin“. Orsøkin til at tílík ”case-studium“ verða gjørd, er, at rokna verður við at finna úrslit, ið eru viðkomandi í einum størri høpi. Vónin er sostatt, at taðsum funnið verður fram til, eisini kann sigast verða galdandi fyri onnur øki; ella sagt á fakmál, at tað kann *generaliserast.*

Kommunusamanlegging er vanliga førd fram sum loysnin uppá nakrar av trupulleikunum í føroysku kommunalu skipanini. Hinvegin hevur mótstøðan móti hesum verið rættliga stór, og tí er kommunalt samstarv ført fram sum ein millumloysn. Spurningurin er sostatt, hvat lærast kann av royndunum frá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum?

Royndirnar vísa, at kommunurnar í Kommunufelagsskapinum við at samstarva hava loyst nakrar av teimum trupulleikunum, sum gjøgnum nógv ár hava sagdar vera viðvíkjandi føroysku kommununum. Sostatt letur til, at samstarvið gevur kommunum bæði hvør sær og sum heild eina betri støðu enn tær annars høvdu havt. Í fyrstu syftu skuldi tað sostatt verið møguligt hjá øðrum kommunum at fingið íblástur til, hvussu tær kunnu fáa líknandi fyrimunir við at samstarva. Tað tær kanska serliga kunnu læra av, er:

- meginregluni um, at hvør kommuna hevur eins nógvar atkvøður
- at byrjað verður í smáum og innan øki, har allar kommunur í samstarvinum hava fyrimun, soleiðis at royndirnar við at samstarva verða mentar so líðandi

Tað eru tó avís viðurskifti, sum eiga at vera havd í huga, tá ið roynt verður at generalisera út frá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum. Fyri tað fyrsta er talan um smáar kommunur, sum eru lutfalsliga javnar í stødd. Fyri tað annað eru tær landafrøðisliga rættiliga nær hvørji aðrari, um sæð verður burtur frá Gjáar komunu. Fyri tað triðja hava tær nógvar og drúgvar royndir í at samstarva. Umframt hetta, so hava tær higartil bert samstarva um smærri øki, samanborið við tey økini, ið ætlanir eru at flyta

til kommunurnar at umsita. Spurningurin er tí, hvussu Kommunufelagsskapurin hevði klárað at tikið tey meiri umfatandi økini til sín. Ber tað til dømis til at nýta royndirnar frá samstarvinum um brunamál og føra tær yvir á skúlamál? Ella ber tað til at nýta royndirnar frá umhvørvismálum, tá ið eldraøkið verður yvirtikið?

Sum ávíst, kann skipanin í Kommunufelagsskapinum vera eitt sindur tung, tá ið fíggjarligar avgerðir skulu takast. Skipanin hevur riggað higartil, men spurningurin er, um hon er nóg dynamisk, tá ið talan verður um meiri krevjandi øki, har fleiri truplar avgerðir verða tiknar. Núverandi tosið um kommunusamanlegging kann tulkast sum ein ábending um, at Kommunufelagskapurin ikki av øllum verður mettur at kunna taka á seg nýggju málsøkini við verandi skipan.

Hetta arbeiðsritið hevur víst, at tað finnast virðismiklar royndir við Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum. Hesar royndir eru fyrst av øllum ein lærdómur um týdningin av samstarvi millum kommunur, og sum man greitt eigur at læra av og byggja víðari á, óansæð hvørja loysn kommunurnar í Kommunufelagsskapinum velja, og óansæð hvør framtíðar kommunala skipanin í Føroyum verður.

## Bókmentir


| | |
|---|---|
| Eythórsson, Grétar Thór. 1998. | *Kommunindelingspolitik i Island. Staten, kommunen och folket om kommunsammanslagningar*. Gøteborg. CEFOS, Gøteborgs Universitet. |
| Holm, Dennis og Bjarni Mortensen. 2001. | *Municipal changes in the Faroes*. Paper lagt fram á The Sixteenth International Seminar on Marginal Regions. Ålesund – Volda, August 2001. |
| Hagstova Føroya. Ymisk ár. 2001. | *Árbók fyri Føroyar*. Tórshavn. Hagstova Føroya |
| Kommunubólkurin. 1992. | *Fyribils álit frá kommunubólkinum*. Tórshavn. |
| Kommununevndin. 1996. | *Verkætlan – Ein nýggju kommunal skipan í Føroyum*. Tórshavn. Føroya Landsstýri. |
| Kommununevndin. 1997. | *Uppgávu- og ábyrgdarbýtið. – Nýggj kommunal skipan. Táttur I, Partur I*. Tórshavn. Føroya Landsstýri. |
| Kommununevndin. 1998a. | *Frágreiðing um kommunurnar. – Nýggj kommunal skipan í Føroyum. Táttur I, Partur II*. Tórshavn. Føroya Landsstýri. |
| Kommununevndin. 1998b. | *Nýggj kommunuskipan. Niðurstøða og tilmæli. Táttur II*. Tórshavn. Føroya Landsstýri. |
| Kommunustýrislógin. 2000. | *Løgtinglóg nr. 87. frá 17.05.2000 um kommunustýri.* |
| Lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging. 2001. | *Løgtingslóg nr. 77. frá 08.05.2001 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar*. Skjal B1. |
| Løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim. 2001 | *Løgtingslóg nr. 70. frá 02.05.2001 um studningslán til ellis- og røktarheim.* |
| Løgmansskrivstovan. 2001. | *Staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur*. Tórshavn. |

| | |
|---|---|
| | Løgmansskrivstovan. |
| Myrvold, Trine Monica. 2001. | *Smått og godt? Om de minste kommunenes evne til å imøtekomme generalistkommunekravet. En kunnskaps-oversikt og indikatordiskusjon.* Prosjektrapport 2001:1. Oslo (N). Norsk Insitutt for By- og Regionalforskning. |
| Nevndin til kanningar av kommunuviðurskiftunum. 1971. | *Frágreiðing frá nevndini til kanningar av kommunuviðurskiftunum.* Løgtingstíðindi 1971– Skjal 3. |
| Rasmussen, Sjúrður. 1987. | *Eitt sindur um ógegnið (inhabilitet) hjá føroyskum kommunustýrislimum.* Fróðskaparrit 33. bók (1987): 50-58. Mentunargrunnur Føroya Løgtings. |
| Reglugerð fyri Kommunu-felagsskapin í Sundalagnum. 2000. | Reglugerð fyri Kommunufelagsskapin í Sundalagnum. |
| Umhvørvislógin. 1988. | *Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd / miljøbeskyttelse.* |
| Uppskot til løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim í Norðurstreymoy. 2001. | |


[1] Síðan hetta hava fleiri nevndir og arbeiðsbólkar viðgjørt spurningin um kommunalu skipanina í Føroyum (sí eisini: Holm og Mortensen, 2001)

[2] Hilmar Høgenni vísti í eini samrøðu m.a. á hesi viðurskifti .

[3] Í samrøðum við bygdaráðslimir í smærri kommunum (við 3 kommunustýrislimum) varð eisini víst á, at í smærri kommunum er tað ein trupulleiki bara at manna kommunustýrini. Um so ein av limunum t.d. er sjómaður, so ger tað alt enn truplari.

[4] Jacob Vestergaard, formaður í Føroya Kommunufelag, hevur m.a. víst á, at uppgávurnar hjá teimum smærru kommununum eru lutfalsliga smærri í vavi og kunnu tí loysast lokalt eins væl og hjá størri kommunum, har uppgávurnar eru tað lutfalsliga størri.

[5] Nøkur av teimum viðurskiftum, sum Sjúrður Rasmussen ger vart við í greinini eru tó broytt í nýggju kommunustýrislógini.

[6] Høvuðsmunurin er, at Argja, Kaldbak, og Kollafjarðar kommunur hava lagt saman við Tórshavna kommunu umframt at Runavíkar og Skála kommunur hava gjørt av at leggja saman pr. 1. jan. 2005 (hetta orsakað av, at samanleggingin ikki kann koma í gildi fyrr enn við eitt kommunuval. Næsta kommunuval verður í des. 2004.)

[7] Samanleggingin av Runavíkar og Skála kommunum kemur í gildi við næsta kommunuval, sum verður 2004.

[8] Landsmyndugleikarnir hava latið upp fyri møguligum sjálvbodnum kommunusamanlegging við lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging. Higartil (febr. 2002) hava Runavíkar og Skála Kommunur valt at leggja saman við heimild í hesi lóg.

[9] Ruskinnsavnan í Tórshavnar Kommunu og Hests og Kirkjubøar kommunum verður gjørd av Tórshavnar Kommunu, og eru hesar kommunur sostatt ikki partur av IRF (Kommununevndin, 1998a: 270, 279, 454).

[10] Hann tykist í ein ávísan mun at verða gloymdur í kjakinum um skipanina av føroysku kommununum.

[11] Kollafjarðar Kommuna fór tó burturúr hesum samstarvi, tá Kollafjarðar Kommuna legði saman við Tórshavnar Kommunu pr. 1. jan. 2001.

[12] Samstarvið viðvíkjandi framhaldsskúlanum er ikki partur av Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum.

[13] Jóhan Petur Petersen man teljast millum tey royndastu skrivsstovufólkini innan kommunala umsiting í Føroyum. Jóhan Petur hevur verið skrivari hjá Sunda Kommunu í tveimum umførum: frá 1951 til 1973 og frá 1986 til 2000, tá ið hann fór frá vegna aldur. Hartil hevur Jóhan Petur eisini verið skrivari hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum frá 1987 til 2001, tá ið hann fór frá vegna aldur.

[14] Jens Marius Dalsgaard hevur m.a. verið skrivari hjá Føroya Kommunufelag og harumframt skrivari hjá Runavíkar Kommunu.

[15] Í eini samrøðu vísti Jóhan Petur Petersen, fyrrverandi skrivari í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum á, at tað fleiri ferðir hevur verið roynt at víðka um samstarvið, m.a. við fáa Eiðis, Saksunar og Funnings kommunur við, men tær hava higartil ikki ynskt at koma uppí.

[16] Eiðis og Sunda kommunur vóru fram til 1944 ein kommuna.

[17] Pláss á ellis- og røktarheimum eru ikki bara fyri tey, ið búgva í kommununi, har ellis- og røktarheimið er. Fyrst og fremst eru røktarheimsplássini ætlað fólkum, ið hava tørv á tí, og eru plássini tí ikki avmarkað til fólk úr ávísum kommunum.

[18] Framhaldsskúlin á Oyrarbakka er ikki partur av samstarvsøkjunum í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, men verður skipaður sum ein sjálvsstøðug eind. Fíggjarliga skipanin er í tveimum pørtum. Fyrst og fremst rinda kommunurnar í mun til talið av skattaborgarum í teirri einstøku kommununi. Harnæst rinda allar kommunur líka nógv fyri flutning av skúlabørnum. Eins og aðrar skipanir viðvíkjandi kommunalum samstarvi í Sundalagnum, so er hendan skipanin eisini til fyrimuns fyri tær smærru kommunurnar. Hetta er serliga galdandi fyri tær smærru kommunurnar, sum hava langa farleið til skúlan, tí við hesari skipan sleppa tær undan at halda fulla kostnaðin fyri flutning av egnum skúlabørnum.

[19] Hetta vístu flestu stýrislimirnir á í samrøðunum.

[20] Hóast støddarmunurin á limakommununum í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, hvat fólkatali viðvíkur, ikki er stórur, so er munurin tó so stórur, at hetta kundi gjørst ein trupulleiki, um kommunurnar høvdu atkvøðu tal í mun til fólkatalið.

[21] Spurningurin um ógegni verður viðgjørdur í Kommunustýrislógini §§ 10-11 (Kommunustýrislógin, 2000).

[22] Barnaforsorgarlógin verður endurskoðað í løtuni (mars 2002) og verður væntandi broytt.Í almenna kjakinum hevur verið víst á, at ætlanin hevur verið at skipa barnaforsorgina í økir og seta fakfólk í hesar økisumsitingarnar, men fleiri av verandi barnaverndum hava víst á, at tey ikki meta hetta vera nakra góða loysn, tí varð uppskotið ikki lagt fyri Løgtingið. Í skrivandi løtu (mars 2002) fyriliggur onki nýtt uppskot um barnaforsorgarlóg.